# Tvær ferðir fult á páskum

**Upptaktin er øðrvísi hesa ferð, enn hon plagar at vera, tí einki blað verður givið út millum 2. og 3. umfar í landskappingini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta blaðið er tað síðsta, sum kemur út undan páskahøgtíðini. Næsta blaðið verður prentað týsdagin 10. apríl ella 3. páskadag. Tað ber við sær, at tað verður ikki møguleiki at gera nakað burturúr her í blaðnum ímillum 2. og 3. umfar.

Tí hava vit hesa ferð valt at seta undanumrøðuna av fótbóltinum nakað øðrvísi upp, enn vit plaga at gera. Hesa ferð umrøða vit øll tíggju feløgini í Formula deildini og avbjóðingarnar, sum tey standa fyri framman hjá teimum í tíggju greinum.

Ítróttarredaktiónin á Sosialinum hevur eisini sportal.fo at røkja. Á sportalinum er møguleiki at dagføra upplýsingar eftir 2. umfar og undan 3. umfari. Tað fara vit at royna at gera.

Vikuskiftið eftir páskir, tá ið 4. umfar verður á skránni, fara undanumrøðurnar og eftirviðgerðirnar av einstøku umførunum aftur at vera í tí legu, sum tær plaga at vera.

## Badmintontalent vitjar í Føroyum

Christian Lind Thomsen, sum dagliga spælir saman við Peter Gade og liggur nummar 18 danska senior ranglistanum, vitjar í Føroyum á páskum. Leygardagin kl. 11 í Badmintonhøllini verður framsýningardystur, har teir bestu føroysku badmintonleikararnir fara at royna seg ímóti Christian Lind Thomsen, sum er mettur at vera partur av heimselituni í badminton.

Tiltakið er ein liður í fyrireikingunum hjá Badmintonsambandi Føroya til alternativu oyggjarleikirnar fyri badmintonleikarar í Grønlandi í oktobermánaði í ár.



## Helgi gevst í B36

Helgi L. Petersen hevur fyribils valt at gevast við Formula-fótbólti. Orsøkin er, at arbeiðið í løtuni ikki gevur umstøður at nýta tíðina, sum krevst til fótbóltin

Helgi varð fyri stuttum settur í leiðarastarv á Tryggingarfelagnum Føroyar, og sambært nýggja fótbóltsportalinum f.fo sigur hann, at hann í løtuni ikki hevur stundir at spæla Formula-fótbólt.

Tó sigur hann, at hann heldur hurðini á gloppi. Enn er spæliloyvði hjá Helga L. Petersen í B36.

# Nú skal KÍ standa sína roynd

**Møguleiki er fyri broytingum í uppstillingini, nú klaksvíkingar í tveimum umførum skulu prógva fyri sær sjálvum, at heimavøllurin kann roynast betur, enn hann gjørdi í fjør**

KÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Hóast munurin á B36 og KÍ ikki var serliga eyðsýndur í Gundadali sunnudagin, so vóru klaksvíkingar ikki nøgdir við leikliga avrikið. KÍ tapti 1-0, og tyngdin í álopspartinum var lítil og samanspælið hekk einki serligt saman.

Nú fær KÍ tveir møguleikar at rætta upp á tingini. Skírisdag fer VB/Sumba at vitja í Klaksvík, og 2. páskadag fara uppflytararnir í B71 norður um Leirvíksfjørð.

Í fjør vóru hagtølini syndarlig hjá KÍ á heimavølli. Semja er í Klaksvík um, at um vón skal verða fyri líkinda plasering í ár, so er alneyðugt at fáa størri úrtøku á heimavølli, og so er serliga neyðugt at vinna heimadystirnar ímóti teimum liðunum, sum KÍ verður roknað at vera upplagdur favorittur ímóti.

Fótbóltslagið í Klaksvík er framvegis gott, og vónirnar eru framvegis góðar. Allir teir, sum vóru í Gundadali sunnudagin, eru tøkir undan Skírisdegi. Verjuspælarin Kareem Smith var orsaka av skaða ikki við ímóti B36. Hann er farin aftur at venja, men hann verður ikki við í morgin.

Tað kann ikki útilokast, at onkrar broytingar og justeringar fara at verða gjørdar á KÍ liðnum, men hvørjar tær møguliga fara at verða, bar tað ikki til at fáa nakað ítøkiligt at vita um í morgun.

# B36 kanónirnar aftur á vøllin

**Á páskum verður tað ikki neyðugt hjá Kurt Mørkøre at goyma nakað av arsenalinum soleiðis, sum hann gjørdi síðsta sunnudag**

B36
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bara tað besta er nóg gott. Tað er hugburðurin í B36. Steypakappingin er fokin. Byrjanin í landskappingini var góð – í hvussu so er hvat úrtøkuni viðvíkur – og nú skal B36 tvær ferðir út at ferðast.

Fokus er á ferðini til Runavíkar seinnapartin í morgin. Tað verður ikki hugsað so nógv um ferðina til Vágs 2. páskadag. Í hvussu so er ikki fyrrenn ferðin til Runavíkar er fingin frá hondini.

Tá ið B36 sunnudagin spældi á heimavølli ímóti KÍ, vóru Mikkjal Thomassen og Hanus Thorleifsson á beinkinum allan 1. hálvleik og eisini eina løtu í seinna umfarinum. Tað vóru teir orsaka av møðsomu landsliðsferðini til Georgia. Heldur ikki Bergur Midjord var ímillum teir fyrstu ellivu.

Allir landsliðsspælararnir eru væl og virðiliga komnir fyri seg, og B36 ætlar sær úr Runavík við øllum trimum stigunum.

Tá ið fleiri av lyklaspælarunum nú eru betri fyri, enn teir vóru sunnudagin, so ber tað við sær, at talan verður um fleiri broytingar millum teir fyrstu ellivu.

Hvussu liðið fer at síggja út, tá ið B36 2. páskadag fer til Vágs, er ein annar spurningur. Í fjør var B36 tvær ferðir í Vági, og árstalsfelagið fór báðu ferðirnar norður um aftur við øllum stigunum. Aðru ferðina vunnu teir 2-1, og hina ferðina vunnu teir 2-0. Tá ið liðini hittust í Gundadali, var úrslitið 2-2.

# Tvær brattar brekkur hjá B71

**Eftir vónbrotið á heimavølli í fyrsta umfarið, eiga sandoyingar nú meistararnar í Gundadali og KÍ í Klaksvík**

B71
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir vóru vónbrotnir, og tað var lætt at fylgja teimum. Sandoyingar stríddust manniliga, tað var um reppið at teir vunnu øll trý stigini, javnleikurin var á stokkinum, men í evstu løtu mistu teir alt ímóti NSÍ.

Í morgin skal B71 í Gundadal at vitja HB, og 2. páskadag skal B71 til Klaksvíkar. Talan kann tykjast um stórar bitar at gloypa hjá unga og í fremstu røð lítið roynda sandoyarliðnum. Serliga í Gundadali verður tað torført ímóti røðini av landsliðsspælarum. Møguleikin fyri stórtapi lúrir, meðan sannlíkið fyri hampiliga góðum úrsliti ivaleyst verður væl størri, tá ið B71 mánadagin fer at vitja í Klaksvík.

Allir teir, sum vóru við í uppgerðini ímóti NSÍ, eru tøkir í morgin. Harafturat kemur tað sera væl við, at Wellington Soares aftur er tøkur, eftir at hann var leikbannaður ímóti NSÍ. Leikbannið komst av, at Wellington varð rikin av vøllinum, tá ið B71 í 2. umfari í kappingini um Løgmanssteypið vitjaði í Streymnesi.

B71 hevur ikki verið í bestu deildini síðani í 2001, tá ið sandoyingar fluttu niður. Hetta árið hilnaðist tað væl hjá B71 ímóti HB. Í Gundadali endaði tað við málleysum javnleiki, og heima á Sandi vann B71 3-2.